# Kjak

Jonna Justinussen

## Smálamb við trimum beinum

*Lat meg byrja við at heita á fólk um at seta ferðina niður, tá tey nærkast seyði. Ansið eftir smálombunum við vegin.*

Várið átti at verið tann besta tíðin: ljós, líðka, fuglar, smálomb..., men vit hava longu fingið ávaring um, at tað samstundis kann síggja sera svart út. Hesi lítlu, fittu smálombini eru í stórum vanda hvønn einasta dag, um vit, ið koyra bil, ikki ansa eftir teimum. Tað er ikki lætt, men tað MÁ gerast. Er óhappið úti, kanst tú tá altíð siga, at tú ROYNDI at ansa eftir.

Smálomb eru óútroknilig. Mamman sleppur teimum uppá fjall, letur tey fara alt ov langt frá sær, og hon rópar bert á tey, tá hon vil sleppa av við mjólkina, ella tá hon heldur, at vandi er á ferð.

var har allatíð, eisini meðan tað svav.

Djóraverndarfelagið hevur adressu í Havn, men fólk ringja úr øllum landinum, annars hevði felagið ikki kunnað virkað. At tað eru býbúgvar, ið ikki hava skil fyri bóndavirki, ið fáa ilt í hjartað, tá tey síggja djór pínast, er tápulig undanførsla, og ein týpisk reaktión hjá einum manni, ið veit, at hann hevur gjørt okkurt skeivt og ergrar seg yvir at vera avdúkaður.

Neyðars maður, nú er hann komin á svartalista hjá øllum, og nú kann hann rokna við, at ØLL hyggja eyka væl eftir, hvussu hansara djór hava tað.

***Tað nýtist einum bert at hava eitt evarska lítið vet av samkenslu fyri øðrum enn sær sjálvum fyri at skilja, at hetta lambið hevði tað ræðuligt.***

Sum fyrrverandi formaður í Djóraverndarfelagnum havi eg eina rættiliga góða vitan um, hvør ringir til Djóraverndarfelagið, og hvat tey ringja um.

Og tá fólk síggja eitt smálamb, har tað eina beinið sær út til at vera skrætt av, kann eg ímynda mær, hvussu telefonin hevur kimað. Tað nýtist einum bert at hava eitt evarska lítið vet av samkenslu fyri øðrum enn sær sjálvum fyri at skilja, at hetta lambið hevði tað ræðuligt, hevði eina pínu, ið tað ikki kundi renna undan, eina pínu, ið





Eyðstein Poulsen
*www.eydstein.fo*

## Skeivt at seta M/S Ågot uppímóti FMF/LMF

*Ein lítil grein, ið eg helt skuldi í Sosialin, hevur fingið skeiva kós. Eg vil tí her reinsa meg fyri skrivingini hjá Kristian Fríðrik, har tað óbeinleiðis framgongur, at vit eru desperat og ikki duga at rokna í prosentum.*

Eg bleiv uppringdur av journalisti, nú vit hava lagt um til at skráskera og frysta svartkalva umborð. Vit umrøddu ymisk viðurskiftir, ið fingu okkum at velja hesa loysnina. Eg nevndi eitt nú, at feski svartkalvaprísurin fellur um summarið, og tað ger frysti fiskurin ikki. Annað var, at vit nú fáa tíð at fiska. Hetta ger, at vit eru meira mobilir á feltinum, og somuleiðis nýtist okkum ikki so nógvar mans sum frammanundan. So tosaðu vit sjálvandi eisini um sølu og landingarútreiðslur, ið eg eins og allir, ið reka skip, halda eru alt ov høgar. Serliga tí tað er lóggivið til hetta sølustað.

Í Samrøðu við journalistin legði eg dent á, at eg ikki var áhugaður í at koma í tvístøðu við FMF/LMF, men tað er nokk júst tað, ið hendan samrøða er endað við, um eg skilji Kristian Fríðrik rætt.

Eg havið ikki ætlað mær at taka kjakið upp um hesa útreiðslu, tí eg meti, at tað er fak/limafeløg, ið eiga hetta borðið. Men tá Kristian Fríðrik nevnir okkum sum dømi, og brúkar okkara útreiðslur í prosentum, er tað ikki av tilvild, at hann velur at fara aftur til mars 2008. Vit hava hetta tíðarskeið roynt við gørnum eftir svartkalva. »Faktuelt« er hetta ein dýrari fiskur, og tískil verða útreiðslurnar prosentvíst minni. Um hetta kann forsvarast veit eg ikki, men kanska onkur annar er nøgdur við hendan prosentprísin.

Eg fara harðliga at mótmæla skrivingini hjá Kristian Fríðrik, har hann leggur upp til, at vit ikki duga at hava eygnakontakt við okkara samstarvsfelagar. Hetta er ikki sømiligt, og víkir frá okkara fatan av tí samstarvi, ið vit hava havt við FMF/LMF. Vit vóna, at hetta er eitt isolerað missforstáilsi hjá Kristian Fríðrik, og at hetta úttalilsið ikki umboðar FMF/LMF.

Til síðst vil eg bert siga, at vit ikki meta okkara verkætlan at vera eina desperata aktión. Hetta er bert ein visioner áskoðan á, hvussu vit ynskja at reka okkara fyritøku á einum sunnum fíggjarligum grundarlagi. Í landingar/søluútreiðslum skuldi hetta, alt annað líka, givið áleið 7% meira í vinningi til skip og manning.

Haldis Matras

## Er skúlin fyri næmingar við menningartarni??

Nógv hevur verið frammi seinastu tíðina um sparingar innan skúlaverkið, og er hetta eitt álvars mál eftir míni meting.

Sat hóskvøldið og hugdi eftir Degi & Viku, har tosað varð við lærarar og næmingar í Venjingarskúlanum um, hvussu sparingarnar komu at raka skúlan hjá teimum. Tey koma at missa nakrar tímar um vikuna í handverk og list, og sjálvandi er tað sera óheppið, men hetta gjørdi samstundis, at eg føldi meg noydda at gera vart við støðuna, vit sum foreldur at næmingum við menningartarni eru komin í seinastu tíðina, orsakað av sparingunum í skúlaverkinum.

Eigi sjálv ein 10 ára gamlan son, sum er menningartarnaður. Hann hevur í skjótt 3 ár gingið í skúla á Eiði við stuðli í 20 tímar um vikuna, og hesa skipan hava vit verið sera væl nøgd við. Hann hevur havt sera góðar stuðlar, og er sera nógv mentur, eisini tá tað kemur til at vera saman við sínum javnaldrum og øðrum børnum í skúlanum. Menningartarnið hjá honum ger, at hann má hava onkran vaksnan hjá sær alla tíðina, og tí er tað ikki møguligt at senda hann í skúla einsamallan.

Nú tímarnir eru býttir út á næmingarnar, vísir tað seg, at sonur mín bert hevur fingið 11 tímar um vikuna, sum hann skal deila við ein annan næming, so at hann kemur í mesta lagi at verða í skúla 2 tímar onkran dag, og 1 tíma aðrar dagar.

Eg havi tosað við NSR tænastuna, sum er undir Sernámdeplinum og kært okkara neyð, men har eru ikki fleiri tímar at geva av, siga tey.

Eiðis skúli hevur veruliga gjørt, hvat tey kunnu, fyri at loysa trupulleikan, men tað sær ikki út til at nytta nakað, tíverri. Øll árini, sonur mín hevur gingið í skúla, hevur samstarvið millum skúla, kommununa og okkum verið fyrimyndarligt, og er tað ein stór hjálp fyri okkum foreldur, tá ið man merkir vælvild og virðing millum partarnar.

Eg eri fullvæl klár yvir, at tað skal sparast, og okkara støða er ikki nakað eindømi, men tað ger ikki støðuna rættvísari í mínum eygum. Sum tað ljóðar, missa onkrir næmingar 1-2 tímar um vikuna, meðan tey veikastu kunnu missa upp í 50-60%, og tað kann eg ikki sum mamma góðtaka. Meti eisini, at spurnartekin kann setast við, um lógin um undirvísingarskjildu verður hildin.

Veit ikki, um hesin bólkurin enn einaferð er valdur, tí tey ikki kunnu svara fyri seg, ella um ætlanin er at spara uppaftur meira við at styggja okkum familjur við børnum við menningartarni av landinum, tí eitt mugu øll gera sær klárt, bæði politikarar og onnur - eitt menningartarn lekist ikki, hóast landið er í kreppu.